# ÐGAR ALT UPP




## Fakta



**Eyðbjørg Olsen (62) úr Vestmanna**
hevur arbeitt á flakavirki síðani hon var 29 ára gomul.
– Eg vildi sleppa út at arbeiða, og tá virkið var her í bygdini, var tað so upplagt at eg fór her, sigur hon.
Eyðbjørg hevur fyri tað mesta arbeitt inni á virkinum, men var í samfull 14 ár í kantinuni.

## Fakta



**Hildigun Garðalíð (62) úr Vestmanna**
hevur arbeitt her á virkinum, síðani byrjanina av 90'unum.
– Maður mín var timburmaður, og um hetta mundið byrjaði at minka við slíkum arbeiðum. Tá valdi eg at fara út at arbeiða, sigur Hildigun, sum annars hevði gingið heima, meðan børn hennara vóru smá.
Tað var ikki fremmant fyri henni at arbeiða í fiski, tí tað hevði hon gjørt í heimbýi hennara, Klaksvík, og fekk nú arbeiði sum feriuavloysari her í Vestmanna.
Seinni fekk hon fast starv, og tað hevur hon enn.

**Óhepnar fylgjur**
Tær báðar hava tosað seg heitar, tí skilligt er, at flakavinnan er eitt evni sum upptekur tær nógv. Og sum tær hava sína greiðu hugsan um.

– Tú mást skilja tað, at fiskivinnan er høvuðsvinna okkara. Ja, hugsa tær til, um nú eingin flakavinna var her á landi?

– Um tað hevði verið so, hevði tað fingið sera óhepnar fylgjur fyri alt samfelagið. So hevði alt steðgað upp, eru tær samdar um.

## Hvat skulu vit gera við øll hesi dugnaligu flakafólkini, um so verður? Hvar skulu tey fara - tí tað eru jú ikki øll ið hava eina útbúgving at hella seg til

Alt kann ikki gerast og framleiðast umborð á einum trolara, eins og á einum flakavirki, har alt verður gagnnýtt til fulnar.

Eyðbjørg vísir á eitt dømi um hetta, sum var, tá ið eitt umfatandi verkfall rakti landið fyri ikki so nógvum árum síðani. Tá hendi tað, at arbeiðið á flakavirkjunum steðgaði, og at bátarnir eisini vórðu lagdir.

– Úrslitið sást beinanvegin: Eingin løn kom til landið, og tað var so galið, at tey ið fingu pensjón máttu bíða við at fáa hana útgoldna, tí eingin peningur var.

– Men tað sum gjørdi tað heila meiri álvarsamt var, at tingmenninir, teir fingu sína løn, meðan hini máttu bíða, greiðir Eyðbjørg álvarsom frá. – Er eingin fiskivinna, kemur heldur eingin peningur til landið, og tá steðgar alt upp. So einfalt er tað.

*snorri@sosialurin.fo*

*Framhald á næstu síðu*